

# Vilt tú skapa menning

## Leiðari til toymi

Tórshavnar kommuna søkir vegna Barna- og ungdómsdeildina eftir leiðara til ráðgevingareindina at arbeiða 40 tímar um vikuna at byrja 1. mars 2008 ella eftir avtalu. Møguleiki er fyri at arbeiða 35 tímar um vikuna.

**Starvið**
- Vera samskipari innan kommunala ráðgeving og menningararbeiði á dagstovnaøkinum
- Vera dagligur leiðari og ábyrgdari av ráðgevingareindini
- Seta upp mál og leggja langtíðarætlanir fyri arbeiðið í eindini
- Samstarva við stovnsleiðarar í mun til menningararbeiði og pedagogiska leiðslu
- Umsita játtanina av tímun til børn við serligum tørvi

**Vit ynskja**

At seta eina eldsál, sum:
- kann ganga á odda
- er opin og kreativ
- dugir væl at hugsa í ressoursum og møguleikum
- dugir at motivera og inspirera starvsfelagar
- megnar at skapa dialog og eitt gott samstarvsumhvørvi

og sum:
- hevur námsfrøðiliga ella aðra viðkomandi útbúgving og eftirútbúgving
- hevur royndir frá stovns-, menningar- ella leiðsluvirksemi
- hevur teldukunnleika á brúkarastøði
- dugir væl at orða seg á føroyskum í skrift og talu

**Vit bjóða**
- eitt nýtt, spennandi og avbjóðandi arbeiðsumhvørvi
- eldhugaðar starvsfelagar
- ymiskar og skiftandi fakligar avbjóðingar
- ávirkan á egið arbeiðsøki
- møguleika fyri skeið, supervisión og eftirútbúgving

## Pedagogiskur ráðgevi

Tórshavnar kommuna søkir vegna Barna- og ungdómsdeildina eftir einum pedagogiskum ráðgeva til ráðgevingareindina at arbeiða 30 tímar um vikuna at byrja 1. mars 2008 ella eftir avtalu.

**Starvið**
- ráðgeving og sparring
- námsfrøðilig tiltøk
- supervisión
- undirvísing og førleikamenning
- menningarprojekt

**Vit ynskja**

At seta eina eldsál, sum:
- er útbúgvin pedagogur
- hevur viðkomandi royndir og eftirútbúgving
- dugir at motivera og inspirera starvsfelagar
- hevur hug og vilja til menningararbeiði á dagstovnum
- hugsar í ressoursum og møguleikum
- hevur áhuga og evni at arbeiða í tvørfakligum toymi
- hevur teldukunnleika á brúkarastøði
- dugir væl at orða seg á føroyskum í skrift og talu

**Vit bjóða**
- eitt spennandi arbeiðsumhvørvi
- eldhugaðar starvsfelagar
- ymiskar og skiftandi fakligar avbjóðingar
- nógvar samstarvsfelagar
- ávirkan á egið arbeiðsøki
- skeið og supervisión
- møguleikar fyri eftirútbúgving

## Setanarviðurskifti

Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

## Meiri fæst at vita

um størvini við at venda sær til Katrin Petersen, deildarleiðara, ella Sigrid Vesturgarð, ráðgeva, telefon 30 20 10.

## Umsókn

saman við viðmælum, royndum og upplýsingum um útbúgving skal vera Tórshavnar Kommunu í hendi innan týsdagin 29. januar 2008 kl. 9.00. Umsóknin skal sendast til Postboks 32, 110 Tórshavn ella bogisim@torshavn.fo

*Aðalmálið hjá Barna- og ungdómsdeildini er at skapa umstøður fyri menning hjá børnum og ungum í Tórshavnar kommunu.*

*Á deildini starvast ein deildarleiðari, ein málsviðgeri og eitt ráðgevandi toymi við trimum pedagogiskum ráðgevum og einum psykologi.*

*Toymið samstarvar við dagrøkt, dagstovnar, frítíðarskúlar og ungdómshús í kommununi í mun til pedagogiskar og psykologiskar spurningar.*

*Við støði í einum konsultativum hugsunarhátti arbeiðir toymið við m.a. ráðgeving, vegleiðing, fakligari sparring og menningarprojektum í mun til børn á dagstovnaøkinum.*

**Lesið meira um onnur størv á www.torshavn.fo**

**Tórshavnar kommuna**




## Politikarabørn

Børn hjá trimum kendum politikarum vitja í útvarpsstovuni millum kl. 11 og 12. Tey fara at tosa um sínar upplivingar við foreldrum, sum eru politikarar. Hvussu er tað í hesum valdøgum, og hvussu hava tey upplivað tíðir, har teirra foreldur hevur verið í politiskum ódnarveðri.



## Psykolog-hjálp til valevnini

Hvussu hava politisku valevnini tað í hesum avgerandi døgunum áðrenn løgtingsvalið, hvussu kunnu tey uppliva valdagin, og hvussu er at verða kolldømdur av veljaranum. Vit práta við Eyðun Joensen, sálarfrøðing, um, hvussu valevnini kunnu hava tað sálarliga í hesum døgum, og hann gevur góð ráð um, hvussu valevnini kunnu klára at takla eitt tap á løgtingsvalinum.

MORGUNSENDINGIN MIKUDAGIN KL. 9-12

RÁS ...títt radio